www.torshavn.fo

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## MÁLSVIÐGERI TIL HEILSU- OG UMHVØRVISDEILDINA

**Tórshavnar kommuna søkir eftir avloysara til Heilsu- og Umhvørvisdeildina fyri málsviðgera í burðarfarloyvi. Talan er um fulltíðarstarv og tíðarskeiðið er til 13. august 2010.**

**FØRLEIKAKRØV**
- Umsøkjarar skulu hava hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni ella samsvarandi royndir og kunnleika innan yrkið.
- Góð samstarvs- og samskiftisevnir og førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Lætt við at orða seg munnliga og skrivliga á føroyskum
- Teldukunnleika á brúkarastigi
- Royndir innan almenna fyrisiting er ein fyrimunur

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Starvið verður sett skjótast til ber og sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**UMSÓKN**
Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skal vera hjá Tórshavnar kommunu, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 22. januar 2010.

**NÆRRI KUNNING**
Meiri fæst at vita við at venda sær til Súna Christiansen, deildarleiðara, ella Boða Haraldson, býarverkfrøðing á tlf. 302010. Sí annars www.torshavn.fo

## PEDAGOGAR

**Tórshavnar kommuna søkir vegna Dagstovnin í Løkjatúni eftir tveimum pedagogum til ávíkavist vøggustovu og barnagarð at arbeiða 30/35 tímar um vikuna at byrja 1. ferbuar 2010 ella eftir nærri avtalu.**

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**UMSÓKN**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Dagstovninum í Løkjatúni, Løkjatún 5, 160 Argir, í seinasta lagi mánadagin 25. januar 2010.

**MEIRI FÆST AT VITA**
um størvini við at venda sær til Eyð Skúvadal, stovnsleiðara, tlf. 214227. Ella við at hyggja inn á heimasíðuna www.123hjemmeside.dk/lokjatun.

## PEDAGOGAR

**Tórshavnar kommuna søkir vegna Býlingshúsið í Norðasta eftir:**
Einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 32 tímar um viku, at byrja 15 .februar.

Einum pedagogi til barnagarðsstovu at arbeiða 35 tímar um vikuna, at byrja 15 februar.

Einum pedagogi til barnagarðsstovu at arbeiða 32 tímar um vikuna, at byrja 1. februar.

Einum pedagogi til tíðaravmarkað starv 20 tímar um vikuna til barn við serligum tørvi, at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu.

Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**SETUNARVIÐURSKIFTI**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**UMSÓKN**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera hjá Býlingshúsinum Norðasta Horn, Granagøta 5, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 25.januar 2010.

**MEIRA FÆST AT VITA**
um størvini við at venda sær til Óla Midjord, stovnsleiðara, tlf. 210906, ella við at hyggja inn á heimasíðuna www.123hjemmeside.dk/nordastahorn

## PEDAGOGUR OG HJÁLPARFÓLK

**Tórshavnar kommuna søkir vegna Frítíðarskúlan í Hoyvík eftir einum pedagogi, fyri pedagog í farloyvi, at arbeiða 20-25 tímar at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu. Starvstíðin er fyribils frá 1. februar 2010 til 31. januar 2011. Eisini verður søkt eftir einum hjálparfólki at arbeiða 20-25 tímar um vikuna at byrja 1. februar 2010 ella eftir nærri avtalu.**

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**UMSÓKN**
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera hjá Frítíðarskúlanim í Hoyvík, Vegurin Langi, 188 Hoyvík, í seinasta lagi mánadagin 25. januar 2010.

**MEIRI FÆST AT VITA**
um størvini við at venda sær til Levi Mørk, stovnsleiðara tlf. 210547 ella við at hyggja á heimasíðu okkara www.ftshoyvik.fo

**Onnur leys størv í Tórshavnar Kommuna – Lesið meira á www.torshavn.fo**

**Deildarleiari** – Býarskipanardeildin
Umsóknarfreist 28.02.2010 kl. 12.00

**Arkitektur** – Býarskipanardeildin
Umsóknarfreist 28.02.2010 kl. 12.00

**Dagrøktari** – Dagrøktarskipanin
Eingin umsóknarfreist

**Pedagogur** – Dagstovnurin á Landavegnum
Umsóknarfreist 25.01.2010

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER LANDSINS STØRSTA KOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja sera stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava eina nútímans og opnan leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta vit somuleiðis innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA